
TALV

John Rødgaard skrivar:

Vit venda aftur til Curt Hansen:

H: Curt Hansen, IM
S: Hjartarson, IM

1. d4	**Rif6**
2. Rif3	**e6**
3. g3	**b5**
4. Bg2	**Bb7**
5. 0-0	**c5**
6. c3	**Be7**
7. Bg5	**Fb6**
8. Ribd2	**cxd4**
9. cxd4	**d6**
10. Bxf6	**Bxf6**
11. e3	**0-0**
12. Rie1	**Rid7**
13. a4	**Rfb8**
14. Bxb7	**Rxb7**
15. Ff3	**Rc8**
16. Rd3	**RBc7**
17. Rie4	**Be7?**



Higartil er einki óvanligt farið fram, men nú fær Curt høvdið fyri seg. Eftir 17. bxa4 stóð enn á jøvnum.

18. d5!!

Og svartur er brádliga í trupulleikum.

18. -	**e5!!**

Bæði 18. -, exd5 19. Ric3, Rif6 20. Rif4 og 18. -, Rie5 19. Rice5, dxe5 20. dxe6, Fxe6 21. axb5 er vánaligt hjá svørtum. Tað besta man vera 18. -, bxa4.

19. a5	**Fb7**
20. Rib4	**Rib8**

Hetta var ikki hugaligt, men hvíta rossið má ikki sleppa á c6. Hvítu riddararnir hava nú ræðið á øllum borðinum.

21. b3!

Forðar 21, -, Rc4


21. -	**Rf8**
22. g4!	

Fyri at svartur skal ikki fáa finnu á f5.

22. -	**Fe8**
23. Kh1	**f6**

23. -, g6 beinanvegin verður jú svarað við 24. g5!, og so kann Rie4 ikki verða rikin burtur við eini finnu.

24. Fg2	**g6**



Eftir støðuni stendur hvítur at vinna!

Flestu høvdu her uttan himpr leikað 25. Tg1, men Curt finnur treystari framhald.

25. f4!	**exf4**
26. exf4	**f5**
27. gxf5	**Fxf5**
28. Rae1	**Rfe8**
29. Fe2!	**a6**

Svartur man hava brellast herviliga at lata finnuna á b5. Nú er Rib8 jú bara áskoðari.


30. Rig3	**Ff7**
31. f5	**Bh4**
32. Fg4	**Bxg3**
33. Fxg3	**Ff6**
34. fxg6!	

34. Re6, Fc3 er ógreitt.

34. -	**Fxg6**
35. Fh4	**Rg7**
36. Rg1	**Ff5**
37. Rxg7+	**Kxg7**
38. Fd4+	**Kf7**
39. Fe3	**Kg8**
40. Fe6+!	

Og vunnið endatalv.

40. -	**Fxe6**
41. dxe6	**Re8**
42. Rid5	**Kg7**
43. Rg1+	**Kf8**
44. Rf1+	**Kg7**
45. Rf7+	**Kg6**
46. Rie7+	**Kg5**
47. Kg2	



Ein vøkur støða, so einføld hon enn er. Svarti rókur og riddari eru innilæstir, so hvítur fer bara fram og mátar tann verjuleysa svarta kongin!

47. -	**d5**
48. Kg3	**h5**
49. h4+	**Kh6**
50. Kf4	**d4**
51. Kf5	

Nú er eingin skilagóð verja móti Kf6 og hareftir Rif5.

Eg skal ærliga viðganga, at tá eg gjøgnumgekk hetta talvið, frøddist eg yvir 18. d5! og restina av talvinum. Teir eru mangir, sum stundum offra eina frúgv. Men hetta — tað er nærmast kunstur!

Danmark hevur fingið ein nýggjan stórmeistara! Í tí nýliga leikaðu kappingini í Brønshøj eydnaðist Curti Hansen at tryggja sær 3. og seinasta stórmeistaranorm. Vit fara at vísa endastøðuna seinri, men skulu bert siga frá, at Pinter, GM, vann kappingina við 8 1/2 stigi av 11. Curt Hansen var á 2. plássi saman við Bent Larsen, GM, og Olafsson, IM. Hetta merkir eisini, at Olafsson gjørdist stórmeistari. Seinri í greinini skulu vit siggja eitt dømi um telving Curts Hansens.

Danski landsliðsbólkurin er í løtuni reiðiliga sterkur. Í bólkinum eru 7 við onkrum tittuli.

Liðið sær soleiðis út:

	ELO	Donsk rating
Curt Hanse, IM	2505	2522
Jens Kristiansen, IM	2455	2426
Jacob Øst Hansen, FM	2430	2456
Ole Jakosen, IM	2400	2414
Erik Pedersen	2395	2415
Jens Ove Fries Nielsen, IM	2390	2414
Carsten Høi, IM	2380	2396
Bjørn Brinck-Clausen, FM	2380	2370
Karsten Rasmussen	2295	2343
Mads Reinert	2260	2323
Jens Hartung	2245	2290
Erling Høiberg	2200	2173
meðal:	2353	2399

Við meðal rating talinum 2353 krevst 7 stig til IM-norm.

Føroyski landsliðsbólkurin er fúsur til FM-85 í Vestmanna.

Kappingin verður væntandi sera hørð, tí at siga allir teir stinnastu eru við.

Jens Chr. Hansen	2232
Luitjen Apol	2166
Torkil Nielsen	2148
Andrias Ziska	2104
Steintór Rasmussen	2087
Hanus Joensen	2087
Suni Ziska	2074
Gunnar Joensen	2015
Grettir Djurhuus	
Olaf Durhuus	

Tíverri eru ratingtølini ikki nýggj men frá 1984.

Tað verða nógvir telvarar í FM-kappingini í ár, umleið 70 ítali.



Bridge

Besti spælihátturin?

Eg fekk hetta spælið í telefonini nú ein dagin, og spurningurin ljóðaði: HVat er besti spælihátturin. Eg skal royna at geva eitt svar, og tey, ið hava hug at rættleiða eru vælkomin.

Tú spælið liðkapping og hevur fingið sp 4 út ímóti 6 sp hjá vestur.

Sp EKJ95	Sp D
HJ 8	Hj EDJ
Rú J753	Rú KD
K1 EJ	K1 D109864

Í FM-kappingini fyri lið er støðan henda:

Støðan í meistararaðnum:

Eyðun Jensen	8	148
Børge Egholm	8	106
Óli Holm	8	82
Páll S. Sørensen	9	69
Rasmus Joensen	9	44
Poul J. Joensen	8	27

Aðrenn seinastu dystirnar í millumrøðunum, ið verða leiktir í dag, er støðan:

Millumrað A	**dystir**	**STIG**
Vagnar Olsen	4	56
Eilif Petersen	4	51
Jørgen Hansen	3	39
Thurid Olsen	4	35
Oddmar Poulsen	2	16
Kjartan Nielsen	5	15
Millumrað B		
Simin Hansen	5	68
Jonny Dimon	5	45
Leif Pedersen	3	39
Áki Mouritsen	3	27
Eli Zachariassen	3	22
Sigurd Heinesen	3	17

Aftur til spælið.

Velur tú at klípa í kleyvara? — ella í hjartara og blaka k1 J?

Ein klíping hevur, tá onki annað ávirkar 50% møguleika at vinna, so um tú valdi at klípa í hj ella k1, kundi sæð út til at verið líkamikið, statistiskt sæð. Tað spæla tó onnur viðurskifti inn her.

Hvi spældi norður ikki hjartara út? Møguliga hevur hann hj kong? Eisini ger seg galdandi, atum tú velur at klípa hjartaran, fært tú við 9 kleyvarum 12,44% møguleika fyri, at k1 kongur situr einsamallur, so um tú tekur fyri k1 ess fyrst, kann henda, at tú als ikki hevur fyri neyðini at klípa hjartaran.

Tað tí fyrst trumfin, tak fyri k1 ess og — um k1 kongur ikki visir seg — klíp í hjartara. Situr hj kongur rætt, blakar tú k1 J til hj ess og stingur ein litlan kleyvara. Nú skal k1 K helst falla (53,14%), tí tú hevur bert møguleika at sleppa út á borðið einaferð í rútara.

Spælir tú fyrst rútara áðrenn tú avgerð, hvat tú vilt spæla uppá, noyðist tú at klípa kleyvaran, um rútari verður spældur aftur, tí tá skal hj ess nýtast til at sleppa út til kleyvaran við.

Aktuelt sat spaðarin 3-3 og norður hevði bæði hj K og k1 K, so hann fór niður, tá hann klípti eftir k1 kongi.

Mortan

Lýsið í sosialinum